UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Click here to enter text.

Tórshavn, tann 3. juli 2017
J.nr.: 17/00356
At tilskila í svari
Viðgjørt: ABD
Tygara skriv:

**Uppskot til kunngerð um sýn og góðkenning av skipum, ið nýta barlastarvatn til hoyringar**

Løgtingið samtykti á vári 2013 at taka undir við, at reglurnar í IMO sáttmálanum frá 2004 *International Convention for the Control and Management of Ships Ballast Water and Sediments* (Barlastarvatnsáttmálanum) verða settar í gildi í Føroyum, tá sáttmálin fær altjóða gildi.

Sáttmálin kemur í gildi altjóða tann 8. september 2017.

Reglurnar í sáttmálanum verða settar í gildi bæði við heimild í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum og við heimild í løgtingslóg um trygd á sjónum.

Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum hevur við heimild í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum fyri stuttum lýst kunngerð nr. 23 frá 21. mars 2017 um viðgerð og tøming av barlastarvatni.

Tann parturin av sáttmálanum, ið hoyrir undir løgtingslóg um trygd á sjónum, og sum landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum varðar av, verður eftir ætlan settur í gildi við hjáløgdu kunngerð.

Eftir hjálagda uppskoti til kunngerð um sýn og góðkenning av skipum, ið nýta barlastarvatn, verða reglurnar settar í gildi fyri føroysk skip og skip undir fremmandum flaggi, sum sigla í føroyskum sjóøki ella sjógvi.

Uppskotið til kunngerð inniheldur m.a. reglur um:

- Krøv til barlastarvatnarætlanir og -dagbøkur
- Krøv til typugóðkenning av skipan til viðgerð av barlastarvatni
- Krøv til sýn og góðkenning
- Gildiskomureglur og revsireglur

Heitt verður á hoyringspartarnar um at lata Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, t.e. uvmr@uvmr.fo, møguligar viðmerkingar til uppskotið í seinasta lagi mánadagin tann **7. august 2017**. Uppskotið er í hoyringstíðini eisin at finna á heimasíðu ráðsins uvmr@uvmr.fo.

Vinarliga

Anna Borg Dahl
ráðgevi

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO